FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

18. februar 2022
Mál: 22/03033-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-123/2021

Svar til fyrispurning 52-123/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um landingar hjá uppsjóvarskipum

Spurningar:

1. Hvørjar avbjóðingar eru við landingartørni hjá uppsjóvarskipum, sum fiska eftir svartkjafti, makreli og sild, tá fiskaríið er í hæddini?
2. Er tað munur á skipum, sum hoyra til virkini, og skipum, sum ikki eru tongd at ávísum virki?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað er skilagott, at skip liggja upp til fleiri dagar og bíða eftir landingartørni?
4. Hvørjar loysnir sær landsstýrismaðurin fyri sær á hesum økinum, soleiðis at skipini sleppa aftur til fiskiskap sum skjótast?

Svar:

Til nr. 1.
Sum víst verður á í viðmerkingunum til spurningarnar, er tað ein avbjóðing við landingartørnum, at skip kunnu koma út fyri at bíða leingi eftir at sleppa framat at landa. Hetta hevur við sær, at skipið missir fiskitíð, at dygdin á fiskinum versnar, meðan bíðað verður, og kann ávirka prísin, sum skipini fáa.

Til nr. 2.
Fiskimálaráðið hevur ikki upplýsingar um hesi viðurskifti.

Til nr. 3.
Tað hevur verið breið politisk semja um, at øll veiða hjá føroyskum skipum í mestan mun skal leggjast upp í Føroyum. Hetta var sett í gildi við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og er endurtikið í sjófeingislógini.

Í samgonguskjalinum hava flokkarnir avtalað, at allur fiskur skal landast í Føroyum, men tilskilað er, at um móttøkuorkan í Føroyum er avmarkað, skal undantak verða givið.

Í uppskotinum til sjófeingislógina verður sum ein av grundgevingunum fyri landingarkravinum víst á, at sum mest av fiski skal koma upp á land í Føroyum fyri á tann hátt at skapa virksemi og arbeiðspláss á landi í Føroyum.

Sjófeingislógin heimilar landsstýrismanninum at gera undantak viðvíkjandi treytini, at veiðan skal verða landað í Føroyum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður í tí sambandi tilskilað, um móttøkukapasiteturin ikki klárar at fylgja við veiðuni – t.d. vegna vantandi móttøkukapasitet av svartkjafti í háárstíð.

Tá støða skal takast til, um tað er skilagott, at skip liggja upp til fleiri dagar og bíða eftir landingartørni, skal landsstýrismaðurin meta um m.a. grundgevingina fyri landingarásetingini, at sum mest av fiski skal koma upp á land í Føroyum fyri á tann hátt at skapa virksemi og arbeiðspláss á landi í Føroyum, upp ímóti vansunum hjá skipunum vegna vantandi móttøkukapasitet.

Tað ber tí ikki til at geva eitt eintýtt svar, hvørt tað er skilagott at gera undantak ella ikki. Svarið veldst um umstøðurnar, ið eru galdandi – og tær kunnu vera ymiskar til ymiska tíð. Her kann vera hóskandi at leggja afturat, at landsstýrismaðurin á hvørjum ári, síðani lógarásetta kravið um landing í Føroyum kom í gildi í 2018, hevur gjørt undantak viðvíkjandi svartkjafti. Hetta hevur verið gjørt eftir ynski frá skipunum og ásannandi, at tað ikki hevur verið sloppið undan langari tíð at bíða eftir at sleppa framat at landa.

Frá um mars/apríl og fram til hálvan juni hevur tí verið loyvt øllum føroyskum skipum at landa alla sína veiðu av svartkjafti uttanlands.

Til nr. 4.
Landsstýrismaðurin fylgir gongdini. Um hann metir, at grundarlag er fyri at geva undantak, verður tað gjørt við broyting í kunngerðini um landing í Føroyum – kunngerð nr. 170 frá 30. desember 2019.

Árni Skaale
landsstýrismaður